Almanna- og Heilsumálastýrið

## Projektsamskipari

### til stuðulsfólkaøkið

Almanna- og heilsumálastýrið søkir eftir projektsamskipara í tíðaravmarkað starv, hvørs uppgáva verður at lýsa og gera uppskot til, hvussu stuðulsfólkaøkið skal skipast framyvir. Starvið er tíðaravmarkað í 1 ár.

Stuðulsfólkaøkið umfatar uml. 128 stuðlar, sum veita stuðul til umleið sama tal av brúkarum um alt landið.

Stuðulin verður veittur eftir barnaforsorgarlógini, forsorgarlógini og løgtingslóg um almannapensiónir. Tey seinastu árini er stuðulsfólkaøkið vaksið munandi og stórur tørvur er á samskipan.

Arbeiðssetningurin verður at lýsa og gera uppskot um skipan av økinum:

- fakliga
- fyrisitingarliga
- fíggjarliga

Harumframt hevur tað alstóran týdning, at hædd verður tikin fyri teimum serligu føroysku viðurskiftunum, fyri at tryggja eina góða tænastu um alt landið.

Vit kundu hugsað okkum ein persón sum:

- dugir at arbeiða sjálvstøðugt,
- er skapandi og framtakshugaður,
- hevur góð evni at orða seg í skrift og talu,
- dugir at hugsa í heildum tá loysnir skulu finnast.

Rætti umsøkjarin hevur viðkomandi fakliga útbúgving. Innlit í stuðulsfólkaøkið og royndir í projektsamskipan er ein fyrimunur.

Samskiparin arbeiðir undir Stýrisbólkinum fyri Stuðulsfólkaøkið, sum er settur av Almanna- og heilsumálastýrinum, og fær møguleika at nýta starvsfólkaorku í stýrinum og stovnum undir tí.

Starvið verður sett sambært sáttmála/avtalu millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jákup H. Foldbo, stjóra í Heimarøktini & Serforsorgini tlf. 317240 ella fartelefon 281643.

Umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til:

**Almanna-og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er sett til týsdagin 2. mai 2000 kl. 14.00.

*Halt* **sosialin**

## Gøtunøvn í Vágs kommunu

Bjóðað verður til kapping um ásetan av gøtunøvnum í Vágs kommunu. Tilfar í sambandi við kappingina fæst á býráðsskrivstovuni.

Uppskot um gøtunøvnini skulu sendast Vágs býráð í seinasta lagi fríggjadagin 12. mai kl. 12.00. Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnu uppskotini – ella at vraka tey øll.

Latnar verða tríggjar virðislønir fyri bestu innkomnu uppskotini:

1. virðisløn Kr. 3.000,00
2. virðisløn Kr. 1.500,00
3. virðisløn Kr. 1.000,00

**Tekniska nevnd/Mentanarnevndin**
**Vágs býráð**

Almanna- og Heilsumálastýrið
Starvsfólkadeildin

## Sjúkrasystrar til summarferiu-avloysarastørv

Av tí, at ov fá hava søkt, verður søkt av nýggjum eftir royndari sjúkrasystir sum summarferiuavloysara fyri ábyrgdarhavandi sjúkrasystir (trissa), t.v.s. til kvøld-, náttar- og vikuskiftisvaktir frá 1. juni 2000 til 31. august 2000.

Tað eru framvegis feriuavloysarastørv leys fyri sjúkrasystrar eftir at søkja – serliga fyri juni mánaða.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Marin Vang, sjúkrarøktarstjóra, tlf. 313540, lokal 266.

Løn- og setanartreytir samb. avtalu millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn.

**Umsóknarfreist:** 14. mai 2000, kl. 14.00.

## Norðstreymoyar Handverkarafelag

Lýsti aðalfundurin verður mánadagin tann 17. apríl kl. 19.30 á maskinmiðstøðini í Kollafirði.

**Nevndin**

## Sosialpsykiatri I

Treytað av m.a. nóg stórari undirtøku, verður skeið hildið í:

**Sosialpsykiatri I**
**í døgunum 1/5–12/5 2000**

**Endamál:**
At skeiðluttakarin fær eina grundleggjandi vitan um, og innlit í tað sosialfrøðisliga umráðið. Eisini skal luttakarin megna at skilja ímillum tørvin hjá sjúklinginum og egnan tørv og mørk.

At skeiðluttakarin nemur sær eina grundleggjandi vitan um tey mest vanligu sálarligu brekini og viðgerðina av hesum.

**Skeiðið er ætlað:**
Eftirlitshavandi fólki innan sosial og heilsuøkið, heimahjálparar, sosial- og heilsurøktarar, sjúkrahjálparar. Somuleiðis verkstaðarassistentar, ið arbeiða innan hetta økið.

**Kostnaður:**
5.500,-

**Skeiðleiðari:**
Lærari frá Skolen i Hammer Bakker í Vodskov.

Tilmelding:
**áðrenn 26. apríl 2000**

Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin »VITAN«, kunnu søkja um stuðul haðani.

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skúla á tlf. 311957 (mánadag–fríggjadag kl. 8–12 & 13–16).

**Tekniski Skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur 75 • Boks 239
FO-110 Tórshavn • Fax 316621

## Útróðrarbátur til sølu

M/B Havfari 32 ton og egningarskúrur á Stongunum við 120 svøvla línum og 10 aut. snellum, fiskiloyvi í bólki 4a, 30 dagar á Føroya Banka, snelluloyvi í Íslandi, til sølu fyri 950.000 kr.

**Tlf. 457735**

## Vestmanna Arbeiðarafelag

Aðalfundur felagsins verður í Bygdarhúsinum 3. mai kl. 19. Um aðalfundurin ikki er viðtøkuførur verður eykaaðalfundur hálvan tíma seinni.

**Vestmanna Arbeiðarafelag**



## Skúlavørður

**Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir skúlavørði til Hoyvíkar skúla.**

**Arbeiðið**
Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. hesar:

- at røkja bygningar og økið uttan um skúlan
- at halda reint og ruddiligt inni og úti
- at hava umsjón við og samskipa reingeringina í skúlanum
- at gera umvælingar
- at ljós, hiti og sanitetsviðurskiftini í skúlanum eru í lagi
- at trygdarbúnaðurin virkar sambært ásettum krøvum

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava handverkaútbúgving, duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevni.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meira fæst at vita**
við at venda sær til Petur Dahl, skúlastjóra, tlf. 315073, ella Eivind Danielsen, byggifrøðing , tlf. 315160.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 8. mai 2000. Viðmerk á umsóknina "Skúlavørður".

Í Hoyvíkar skúla eru 365 næmingar, og har starvast 24 lærarar. Skúlin varð bygdur í 1977 og útbygdur í 1992.

## Barnsburðaravloysari

**Søkt verður eftir barnsburðaravloysara fyri pedagog í býlingahúsinum á Ternuryggi**

**Starvið**
Talan er um eitt starv við 30 tíma arbeiðsviku á barnagarðsstovu. Starvið verður sett skjótast til ber.

**Førleikakrøv**
At tú er útbúgvin pedagogur. At tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt, er røkin og er førur fyri at taka avgerðir í arbeiði sínum.

**Setunarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meir fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Nicolinu Skaalum, leiðara, tlf. 318626.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og roydnir skulu vera Býlingshúsinum á Ternuryggi, Turiðargøta 5A, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. mai 2000.

Tórshavnar kommuna



**VEGG SAGING**
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

**HOL SAGING**
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

**GÓLV FRESING**

**GÓLV SAGING**
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

**GÓLV SLÍPING**

**FØROYA BETONG v/Hjaltur Tausen SAGING**
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820

Fróðskaparsetur Føroya

## Búskaparfrøðingur

**Undirvísingar- og granskingarstarv á Søgu- og Samfelagsdeildini.**

Eitt undirvísingar- og granskingarstarv í búskaparfrøði er leyst á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya við setan frá 1. august 2000 ella skjótast gjørligt. Starvið er liður í uppbygging av fakligum førleika í búskaparfrøði.

**Gransking**
Á Søgu- og Samfelagsdeildini skal búskaparfrøðilig gransking mennast. Granskingin á deildini fer fram í søgu, siðsøgu og samfelagsvísindum. Granskingarvirksemið hjá tí, ið settur verður, verður í stóran mun at laga eftir tí serkunnleika, ið viðkomandi hevur.

**Undirvísing**
Undirvísing á Søgu- og Samfelagsdeildini í búskaparfrøði fer fram á ársnámum og á serligum evnisskeiðum. Ætlan er harumframt at skipa fyri BA-útbúgving, har høvuðsdentur verður lagdur á búskap. Undirvísingararbeiðið fevnir um undirvísing, dagføring av skeiðsætlanum, fyriskipan av próvtøkum og samskifti við leysalærarar og próvdómarar.

**Førleikakrav**
Umsøkjarar mugu í minsta lagi hava kandidatútbúgving ella tilsvarandi í búskaparfrøði. Umsøkjarar við vísindaligum starvsroyndum í búskaparfrøði hava fyrimun.

**Metingarnevnd**
Sett verður ein metingarnevnd at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum. Gjørt verður vart við, at hvør umsøkjari fær sendandi raðfestingina av øllum umsøkjarunum og metingina um egnan førleika.

**Umsóknir**
Umsóknir við ævilýsing (curriculum vitae), avritum av próvskjølum, viðmælum ella tilvísingum, serprentum og avritum av vísindaligum ritgerðum (í 4 eintøkum) mugu vera Setursskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 1. mai 2000.

**Lønar- og starvsviðurskifti**
Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Fróðskaparsetur Føroya**
Setursskrivstovan
Handan Á 5 • 100 Tórshavn

## PLAST VINDEYGU og HURÐAR á GOYMSLU



eisini útgangand vindeygu

FØROYSK FRAMLEIÐSLA

team 85 • 31 65 11

**ALUMINIUM & PLASTVIRKIÐ P/F**
**www.plastverki.fo**

**Umsiting:**
Tel 31 87 96
Fax 31 87 46
Í Svanga 23
Postboks 199
FO-110 Tórshavn
e-mail: plastvirki@plastvirki.fo

**Verkstaður:**
Norðagøta

## DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**

## Fyristøðufólk

Søkt verður eftir fólki at fyriskipa vaskingina umborð á NORRØNU, meðan hon liggur á Havnini í tíðarskeiðnum 15.05. til 08.09.00.

Tíðirnar eru hesar:
Mánadag 06:00–08:30
Mikudag 15:00–18:00
Fríggjadag 06:00–08.30

Tann, ið settur verður, skal biðja tað fólk, ið krevst.

Løn sambært avtalu.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. apríl 2000.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja til Jónfinn á tlf. 345900.

**P/F SMYRIL LINE**
**Postsmoga 370**
**110 Tórshavn**